# Náttúran hevnir seg

Økokritikkur og ein yrking eftir
Jóanes Nielsen

# Náttúran sum ein sjálvsagdur pallur í yrkingum

- Fjøll, urðar, bjørg, hamrar, líðir, fuglar, skýggj, blómur, gras, áir, vindur, hav, regn og sól og máni
- Skiftandi lýsingar, men áhaldandi - úr romantikki umvegis súmbolismu til modernismu
- Náttúran er sum ein pallur, ið føroyskar yrkingar standa á og gera myndir burturúr
- William Heinesen, 7 yrkingasøvn, øll náttúruheiti – uttan eitt (“Hymne og harmsang”, 1961)

# Hvat er náttúra?

- Eitt dømi um skilmarking:
  - ”the term “nature” refers to everything which is not human and distinguished from the work of humanity”
  - “nature is opposed to culture, to history, to convention, to what is artificially worked or produced”

Kate Soper: *What is Nature? Culture, Politics and the Non-Human*. Blackwell Publishing, Oxford 1995, 15

# Økokritikkur

- Cheryll Glotfelty (1996): “An earthcentered approach to literary studies”
- Lynn White (1967): “Christianity is the most anthropocentric religion that the world has seen”
- At yrkja um og vegna alt tað, sum ikki er menniskjaligt og ikki er úrslit av menniskjaligum virksemi – og um samspælið millum menniskjaligt og ikki-menniskjaligt
- Sum bókmentafrøðingur ella lesari kanna yrkingar við sama “earthcentered approach”

# Eitt skifti – ikki bara heimlig náttúra

- Ursula K. Heise (2008) : frá “sense of place” til “sense of planet”, t.e. ein tilvitan um allan heimin
- “global citizenship”
- Náttúrufyribigdi eru alheimslig, partar av einari økoskipan, ein vatnflóð er ikki longur ein lokal hending, men eitt tekin um globalar broytingar



Heise (2008): *The Environmental Imagination of the Global*
“this vision had a greater impact on thought than did the Copernican Revolution... From space we see a small and fragile ball” (Brundtland 1987)

# Michel Serres

- Pallurin fer undan, og vit síggja:

  at kviksandet opsluger duellanterne; at floden truer krigeren: jorden, vandet og klimaet, den stumme verden, de tavse ting, der før blev anbragt som rene kulisser omkring de sædvanlige forestillinger, alt dette, der aldrig interesserede nogen, stiller sig nu med ét brutalt i vejen for vores rænkespil. Bryder ind i vor kultur, som aldrig havde gjort sig mere end lokale, vage, kosmetiske forestillinger om naturen / Før var den lokal – en flod, en sump – , nu er den global – Planeten Jorden

  Michel Serres*: Naturpagten (Le contrat naturel, 1990)*. Oversat af Per Aage Brandt. Rhodos, Kbh. 1992, 12

# Jóanes Nielsen (f. 1953)



# Jóanes Nielsen: Neytini gera uppreistur

Yrkingar um kærleika, politikk og náttúru

Fyrsta yrkingin, einki heiti, ein long episk yrking um neyt, sum koma brestandi inn í gøturnar í London




2007

Fylgini høvdu kós móti London.
Brúgvar hoknaðu undir tyngdini av villum kjøti
sum kistur av leðri
stevndu deyðar kýr eftir áunum.
Líðirnar nøtraðu.
Í rapaðum vakstrarhúsum
liðu rósur støvdeyðan.
Í nøkrum býum opnaði hervaldið eld
áðrenn kropparnir savnaðust til brent myrkur
hildu rotturnar veitslu
                í júgrum
                múlum
                baktarmum.

[...]

Tey válaðu gjøgnum gular akrar
stútaðu seg inn í markanaðarskálar

# Gongdin

- 7 síður, kann býtast sundur í 6 partar
  - Fylgja neytunum úr erva
  - Fylgja neytunum nær
  - Neytini koma til London
  - Tarvurin Svarti, leiðarin, verður lýstur

    *kendi hann angan av sevjuríkum áarbakkagrasi*
  - Svarti verður álopin av hermonnum, dripin
  - Svarti verður krøktur í ein vogn og neytini fara aftur haðani tey eru komin:

    *[hermenninir] settu kós norðuryvir*

    *eltir av trúføstum kleyvaljóðum*

# Kollveltingarroynd

- “Hjartað sang og dukaði móti teirri siðmenning / sum tók móðurtignina frá kvíguni / geldi tarvin”
- Høg ferð í yrkingini, vit renna saman við neytunum, t.d. gjøgnum High Gate (har Marx liggur grivin), inn í marknaðarskálar o.s.fr.
- Ekspansión, víðkan, fram til part 4 - Svarti
- Ein vilji til uppreistur, men eisini ein varhugi av, at tað einki nyttar
- “Svarti visti, at sólin fór at seta yvir hansara deyða kropp”
- Kollveltingarromantikkur og apokalypsa í einum

# Miseydnaður uppreistur

- Yvir yrkingini stendur ein parafrasa, Johs. 3,16:

  *Umsíðir forbarmaði Gud*
  *seg yvir neytini*
  *sendi sín einborna til Onglands*
  *hesaferð í tarvaskapi*
- Menniskjasonurin sum tarvur, umboð fyri náttúruna
- Neytini umboða náttúruna og eru góð
- Hermenninir umboða siðmenningina og eru óndir
- Tað ónda sigrar
- At síggja til ein einføld dikotomi, náttúran verður eyðrænd, kúgað í einari kapitalistiskari siðmenning

# Men

- Náttúran er longu ein partur av siðmenningini
  - vakstrarhús, nasaringar o.s.fr.
- Ómøguligt at skilja náttúru frá siðmenning
- Neytini er ald, blómurnar og tomatirnar standa í vakstrarhúsum, fuglarnar halda blómurnar á listasavninum vera veruligar o.s.fr.
- Torført at síggja og gera mun á náttúru og siðmenning
- Neytini eru sjálvi ein partur av tí, sum tey gera uppreistur ímóti

# Skilmarkingin meiri samansett

- ”thinking of nature as that which is utterly unaffected by human dealings, we are thinking of a kind of being which rather little on the planet corresponds”

  Kate Soper: *What is Nature? Culture, Politics and the Non-Human*. Blackwell Publishing, Oxford 1995, 15

- Marx í *Die Deutsche Ideologie* (1845/46) : náttúran, sum var áðrenn menniskjað, er ikki longur til

# Tað utopiska

- Neytini eru longu siðmenning
- Men náttúran – og nátúrliga tilveran – livir sum utopi
- Svarti:

  *Hann hugsaði um harðbalnu øldirnar*
  *Tá bjørnin ráddi í skógardýpinum*
  *og úlvurin bar fram síni fullmánakvæði*

- Dreymur um eina tilvera, sum neytini sjálvi ikki kundu verið partur av

# “Úlvsins fullmánakvæði”

- Alt verður endavent eina stutta tíð
- Møguleikin fyri ein øðrum samfelag verður drigin fram
- Síðani tekur ráðandi skipan við aftur
- Men hugsanin um, at alt kann verða øðrvísi, hevur fingið rúmd, kjøt og blóð, í uppreistrinum

# Nýggj javnvág

- Orð sum “undur”, “fyrigeving”, Johs. 3, 16
- Ábending um, at ein miseydnaður uppreistur kann elva til eina nýggja byrjan

- Tvær yrkingar at bera saman við at enda




1969

Bergur Djurhuus Hansen
Fróðskaparsetur Føroya

# “Bestefaren min var meir enn ein skrue, han var ein naturleg mann”

*kven kan ikkje se han for seg når han kjem inn til oslo / - huvudstaden – på drammensveien ved lysaker / med ei sauedrift han skal selje*

- Eisini samanbrestur, náttúra-siðmenning, men eingin uppreistur, eingin kreppa
- Hjá J. Nielsen hevur samanbresturin fingið eina vend, “animal horror”

# William Heinesen, “Verdens undergang”, 1961

- Í London 1961 (WH):

  *Ganske almindelig torsdag aften i London / ... Netop da skete det / Det skyldtes vist nok en teknisk fejl*

- Í London 2007 (JN):

  *Fylgini høvdu kós móti London /... men akkurát tá hendi undrið*

- Flytingar, rørsla, ljóð og so avgerandi hendingin, alt steðgar, tøgn
- Í 1960’unum ikki umhvørviskreppa, men óttin fyri kjarnorkukríggi
- Eitt annað slag av oyðing, ein onnur apokalypsa
- Hjá J. Nielsen vónrík utopi:

  *Tað var sum eitt lítið petti av jørðini knappliga opnaðist*
  *sum náttúran av handahógvi*
  *gandaði fram tað allar vakrasta, hon átti*

- Tøgnin – náttúran uttan orð og menniskjaligt virksemi
- Ta myndina taka neytini við sær aftur á básarnar og í sláturvirkini

# Økokritikkur

- Cheryll Glotfelty: ”the troubling awareness that we have reached the age of environmental limits”

  *Literary Studies in an Age of Environmental Crisis, 1996*

- Setur krøv til yrkjarar og bókmentagranskarar

# Endaorð

- Allur heimurin er "okkara" náttúra (ikki bara náttúran í Føroyum ella Norðurhøvum)
- Vit eru siðmenning og náttúra
- Ein viðbrekin javnvág, sum er hótt
- Ein yrking um eina hending í London er eisini ein yrking um Føroyar
- Eins og undir kalda krígnum og óttanum fyri kjarnorkukríggi
- Ein utopi sum stavnhald
- Trupulleikin er ikki siðmenning, men *kapitalistisk* siðmenning